# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Til alla lukku var Churchill forsætisráðharri í mai í 1940, tí Lord Hailfax hevði tingast við Hitler um frið*

*Ian Kershaw*

# Íslendska bankakervið undir umsiting

**Íslendska Altingið samtykti í nátt lóg, sum gevur stjórnini sera víðar heimildir á fíggingarøkinum**



*Íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde*

*Mynd: Polfoto*

Nakað eftir midnátt í gjárkvøldið samtykti íslendska Altingið eina sokallaða neyðlóg, sum ætlandi skal fáa tamarhald á teirri stóru kreppu, sum landsins bankakervi er í.

Neyðlógin kom minni enn eitt samdøgur eftir, at Geir H. Haarde, forsætisráðharri, hevði sagt, at tað var ikki neyðugt við tiltøkum longur. Men í einari beinleiðis útvarps- og sjónvarpsrøðu fyri íslendsku tjóðini seinnapartin í gjár ásannaði forsætisráðharrin, at nógv var broytt til tað verra í gjár.

- Støðan er so álvarssom, at vit kunnu fara á húsagang, segði Geir H. Haarde.

Eftir tingingar í samgonguni legði stjórnin eitt neyðlógaruppskot fyri Altingið í gjár, og tað samtykti tingið seint í gjárkvøldið. Lógin gevur figgjarmálaráðnum hjá stjórnini so víðar heimildir á bankaøkinum, at í veruleikanum er alt bankakervið sett undir almenna umsiting. Lógin gevur stjórnini heimild til at stovna egnan banka ella at yvirtaka teir, sum eru.

Lógin ber eisini í sær, at tann almenni Íbúðargrunnurin yvirtekur øll bústaðarlán frá bankunum.

Av teimum 63 tinglimunum vóru 62 hjástaddir á tingfundinum, tá atkvøtt bleiv, og tað er sambært íslendsku bløðunum sjáldsamt. 50 altingslimir atkvøddu fyri neyðlógini.

Íslendsku bløðini vita at siga, at umboð fyri Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF hava verið í Íslandi og givið stjórnini góð ráð um, hvat gerast skal.

# Dráp kostaði ráðharrum starvið

**Í Kroatia hava tríggir ráðharrar fingið sekkin, eftir at dóttir ein kendan sakførara bleiv funnin myrd**



*Verjumálaráðharrin, Berislav Roncevic, fekk eisini sekkin*

*Mynd: AP*

Eitt dráp hevur elvt til eitt veruligt politiskt stórvask í kroatisku leiðsluni.

Um vikuskiftið varð dóttir ein kendan sakførara funnin skotin uttan fyri dyrnar á íbúð síni í høvuðsstaðnum Zagreb. Við fjølmiðlarnar segði Ivo Sander, forsætisráðharri, at talan var um eitt mafiamorð, og løtu seinni koyrdi hann innanríkisráðharran, løgmálaráðharran og verjumálaráðharran frá. Somu lagnu fekk ovastin fyri kroatisku løgregluni.

Ivo Sander hevur leingi roynt at fáa bilbukt við tann skipaða kriminalitetin í Kroatia, og avgerð hansara at koyra løgregluovastan og teir tríggjar ráðharrarnar, sum vara av løgregluni, frá, verður tulkað sum eitt tekin um, at forsætisráðharrin var ikki nøgdur við teirra avrik á økinum.

- Mín stjórn fer ikki at góðtaka, at skipaðir brotsmenn fáa ta uppfatan, at teir kunnu gera, sum teimum lystir, segði Ivo Sander, tá hann boðaði frá avgerðini at koyra ráðharrarnar og løgregluovastan frá.



*Sambært kanningunum er Barrack Obama klárt framman fyri John McCain*

*Mynd: Polfoto*

# Obama klárt á odda undan dystinum í nátt

**Í nátt verður annar sjónvarpsdysturin millum amerikonsku forsetavalevnini, og nú má John McCain spenna seg út**

Eru meiningakanningarnar eftirfarandi, er Barrack Obama rættiliga klárt á odda í amerikanska forsetavalstríðnum undan sjónvarpsdystinum, sum verður í Nashville í nátt.

Ein kanning, sum CNN kunngjørdi tíðliga í morgun, vísir, at var forsetavalið nú, hevði Obama fingið 53 prosent av atkvøðunum, og McCain hevði fingið 45. Ein tilsvarandi kanning hjá CBS gevur teimum báðum ávikavist 47 og 43 prosent, og í einari kanning hjá NBC fáa teir 49 og 43 prosent.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at allar kanningarnar vísa, at munurin millum tey bæði valevnini økist í hvørjum undan sjónvarpsdystinum í nátt. Teir halda, at tað eru fleiri orsøkir til framgongdina hjá Barrack Obama. Eitt er tann búskaparliga kreppan í USA, eitt annað er, at umdømið hjá Bush, forseta er so vánaligt sum ongantíð fyrr, og ein triðja orsøk er, at Sarah Palin er ikki so væl umtókt longur.

## STUTT SAGT

### Breyt beinið á Antarktis

Starvsfólkini á einari norskari kanningarstøð á Antarktis noyddust í gjár út í kuldan at rudda eina flogbreyt, so eitt flogfar kann koma eftir einum av starvsfeløgunum, sum hevði fingið skaða og mátti flytast á sjúkrahús í Suðurafrika. Maðurin hevur brotið annað beinið.

Seks fólk eru á Troll-kanningarstøðini. Teirra millum er ein lækni, men beinbrotið var so mikið álvarssamt, at hann kendi seg noyddan at senda mannin á sjúkrahús. Hesa tíðina á árinum er hávetur á Antarktis og umleið 25 stiga frost, og tá eru allar flogbreytirnar stongdar. Norðmenninir ætla sær at rudda ta tveir kilometrar longu flogbreytina so frægt, at eitt flogfar kann seta seg og fara avstaðaftur. Flogferðin tekur einar sjey tímar.

Tað er ikki so lætt at fáa fatur á einum flogfari, sum kann átaka sær uppgávuna at fara til Antarktis á hávetri eftir einum sjúklingi, men á Troll-kanningarstøðini vænta tey, at tann skaddi maðurin sleppur á sjúkrahús seinni í vikuni.

### Løgreglan kannast fyri rasismu

Borgarstjórin í London, Boris Johnson, vil hava greiði á, um hald er í skuldsetingum um, at løgreglan í býnum er gjøgnumseyrað av rasismu.

Felagsskapurin hjá teimum svørtu løgreglumonnunum í Bretlandi, MBPA, og felagsskapurin hjá teimum svørtu løgfrøðingunum, SBL, hava mælt fólki í minnilutunum í London frá at fáa sær starv í løgregluni, og talsmenn hjá teimum svørtu løgreglumonnunum siga bart út, at teir kenna seg sum fíggindar millum sínar hvítu starvsfelagar.

Ovastin fyri løgregluni í London, Sir Ian Blair, fór frá seinasta fríggjadag, eftir at Boris Johnson, borgarstjóri, hevði sagt, at fólkið í býnum hevði ikki álit á ovastanum longur.